


# Føroya Banki eggjar dugnaligum útisetum at koma heimaftur

**Føroya Banki hevur saman við Tórshavnar Kommunu gjørt avtalu við Bitland um at vera høvuðsstuðul á ráðstevnuni JobMatch 2008, ið hevur til endamáls at fáa væl útbúnar útisetar heimaftur at arbeiða**

Á stevnuni fara føroyskar fyritøkur og stovnar at sýna fram á básum, og útisetar, sum vitja stevnuna, fáa tí gott innlit í, hvørjir spennandi og avbjóðandi arbeiðsmøguleikar eru í Føroyum.

"Vit hava valt at stuðla ráðstevnuni, tí vit halda, at hon er eitt sera gott og týdningarmikið átak," sigur Bjarki Mohr, starvsfólkaleiðari í Føroya Banka.

Hann heldur, at átakið hjá Bitland at eggja útisetum at koma heimaftur at oysa av sínum dugnasemi og eldhuga hevur sera stóran samfelagsligan týdning.

"Skulu Føroyar menna seg til eitt vitanarsamfelag, er umráðandi at fáa væl útbúgvin fólk heimaftur. Føroya Banki er eitt so stórt virki í Føroyum, at vit síggja tað sum eina samfelagsábyrgd at stuðla tílíkum tiltøkum," sigur Bjarki Mohr.

Føroya Banki fer eisini á JobMatch 2008 fyri at finna nýggj starvsfólk og vísa útisetum, at bankin er eitt spennandi arbeiðspláss. Bankin er við børsskrásetingini í 2007 vorðin nógv meira altjóðagjørdur, og hendan altjóðagerðin krevur áhaldandi menning.

"Okkum tørvar í dag eisini fólk, sum hava arbeiðsroyndir uttanlands, og serfrøðingar á ymsum økjum, og JobMatch er eitt upplagt høvi at kanna, hvør kundi hugsað sær at komið heimaftur," sigur Bjarki Mohr.

Í Føroya Banka-samtakinum starvast í løtuni 283 fólk. Av teimum eru 255 í Føroya Banka, 24 í tryggingarfelagnum Trygd og fýra í húsameklarafelagnum Skyn.

Visiónin hjá Føroya Banka er at vera leiðandi peningastovnur í Føroyum og altjóða at veita úrvaldar fíggjartænastur. Missiónin hjá bankanum er at gera fíggjarliga møguligt at fullnýta síni evnir og møguleikar.

*Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka*

